## Úr Løg-tinginum





## Fyrsti fundurin í ár

*Fyrsti tingfundurin í ár verður settur í dag klokkan hálgvum tvey*

John Johannessen

Fyrsti tingfundurin síðani 22. desember í fjør verður settur í dag klokkan hálvgum tvey seinnapartin. Á skránnni eru fimm mál. Tvær fyrstu viðgerðir, eitt svar uppá fyrispurning, nevndarval sambært grein 25 og framløga.

Tær báðar fyrstu viðgerðirnar eru ávíkavist fyrsta viðgerð tingmáli 20/1999, ið er uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi »lov om patienters retsstilling«, og fyrsta viðgerð av tingmáli nummar 28/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um álíkning, innkrevjing, eftir lit og annað í sambandi við skatting av inntøku av kolvetnisvirksemi. Hetta málið legði Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, fyri tingið tann 22. desember.

Svarið uppá fyrispurning eigur Signar á Brúnni. Hann skal svara Rúnu Sivertsen uppá fyrispurning viðvíkjandi skúlanum á Trøðni. Fyrispurningurin varð fráboðaður 24. november í fjør.

Nevndarvalið verður framt sambært grein 25 í stýrisskipanarlógini. Talan er um nevnd til viðgerð av tingmáli nummar 27/1999, sum er uppskot til løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann.

## Fiskivinnuskúlin skipar fyri skeiðum

Havbúnarfelagið hevur ynskt at bøta um ástøðiliga førleikan hjá teimum, sum starvast í føroysku alivinnuni, og hevur tí heitt á Fiskivinnuskúlan

Fiskivinnuskúlin í Vestmanna skipar í hesum døgum fyri tveimum skeiðum til alivinnuna. Eitt skeið er til alarar á sjónum og eitt til smoltalarar. Skeiðini eru ætlað til starvsfólk í føroysku alivinnuni, sum ikki hava serliga útbúgving innan virkisøkið.

Havbúnarfelagið hevur ynskt at bøta um ástøðiliga førleikan hjá teimum, sum starvast í føroysku alivinnuni, og hevur tí heitt á Fiskivinnuskúlan um at skipa tvey skeið – eitt fyri starvsfólk á alistøðum á sjónum og eitt fyri starvsfólk á smoltstøðum.

### Innihald á skeiðnum

Á skeiðunum verður m.a. undirvíst í laksalívfrøði, fóðurlæru, aling og umhvørvi, kynsbúning og vøkstri, sjúkufyribyrging, smoltifisering, resirkulering og tøku og hagreiðing.

Hesi fyrstu skeiðini til alivinnuna eru á byrjunarstøði og verða møguliga fylgd upp við dagskeiðum, har meira verður gjørt burturúr einstøkum evnum.

### Á Hotel Eiði

Skeiðini verða skipað sum vistarskeið á Hotel Eiði 7. og 8. feb. og 14. og 15. feb. 2000. Tey, sum undirvísa á skeiðunum eru: Ingvard Fjalstein, Ragnar Joensen, Guðrið Andorsdóttir, Hørður Wardum, Rúni Dam, Jan Sørensen, Ole Jurgens, Lena Leivsdóttir og Janet F. Johannesen.

# Virðisbrævamarknaður klárur innan eitt ár



*Jonhard Eliasen, búskaparfrøðingur í Landsbankanum, hevur verið við í fyrireikingararbeiðinum at stovna virðisbrævamarknaðin*

Eirikur Lindenskov

Á landsstýrisfundi í gjár kunnaði Anfinn Kallsberg, løgmaður, landstýrið um arbeiðið við at seta á stovn føroyskan virðisbrævamarknað.

Landsbankin og landsstýrið eru samd um at stovna marknaðin sum ein løggildan marknað (autoriseret markedsplads) sambært lógini um virðisbrævahandil.

Hetta merkir, at marknaðurin verður skipaður á eins høgum støði sum ein fondsbørsur, sigur Jonhard Eliasen, búskaparfrøðingur í Landsbankanum. Ein løggildur marknaður hóskar betur til føroysk viðurskifti enn fondsbørsur, við tað at minni fyritøkur eisini kunnu skrásetast á marknaðinum.

Marknaðurin skal sambært lógini stovnast sum partafelag. Landsbankin arbeiðir í hesum sambandi víðari við at fáa fleiri partar við í sjálva stovnanina av felagnum. Landsstýrið og landsbankin meta, at tað er týdningarmikið, at javnvág er millum tey týðandi áhugamálini, sum gera seg galdandi á einum virðisbrævamarknaði. Hesi áhugamálini kunnu í stuttum sigast at vera:

1) íleggjarar
2) fyritøkur
3) peningastovnar og
4) myndugleikar.

Miðað verður tí eftir, at javnvág millum hesi áhugamál verða tryggjað í felagnum, sum skal reka marknaðin.

Jonhard Eliasen sigur at enda, at eftir ætlan verður virðisbrævamarknaðurin klárur innan eitt ár.

# Hótta við at leggja Landssjúkrahúsið lamið

*Verður hildið fram við ætlanunum um at leggja størv á Landssjúkrahúsinum saman, fer Havnar Arbeiðsmannafelag í verkfall klokkan ellivu í morgun*

John Johannessen

Eingin matur og eingin portørtænasta á Landssjúkrahúsinum. Hetta verður støðan á Landssjúkrahúsinum frá klokkan ellivu fyrrapartin, verða ætlanirnar um at leggja størv saman ikki sleptar.

Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, greiðir frá, at felagið hevur sent leiðsluni á Landssjúkrahúsinum hóttan um verkfall í sambandi við sparingarnar.

Arbeiðsmannafelagið góðtekur ikki, at størv við ymiskum sáttmálum verða løgd saman fyri at fremja sparingar á sjúkrahúsinum. Hetta hevur felagið fyrr gjørt leiðsluni greitt, men tá uppsagnir kortini eru sendar út, har grundgevingin verður søgt at vera, at starvið verður lagt saman við øðrum starvi, er tolið hjá arbeiðsmannafelagnum nú uppi. Felagið sammetir støðuna við, at til dømis læknastarvið og laborantstarvið vóðru løgd saman og undir sama sáttmála.

Havnar Arbeiðsmannafelag var á fundi við Høgna Joensen, sjúkrahússtjóra, í gjár, og fekk hann at vita, at felagið stendur fast við verkfallshóttanina.

Verður verkfall á Landssjúkrahúsinum, kann væntast, at onnur feløg eisini fara at stuðla, og tá kann verkfallið gerast ógvuliga umfatandi.



*Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag hóttir við verkfalli á Landssjúkrahúsinum í morgun kl 11*

# Lóg fyri rættindi hjá skúklingum

*Rættindini hjá sjúklingum skulu nú niðurfellast í lóg. Í dag er hetta til fyrstu viðgerðar í tinginum*

John Johannessen

Sjúklingar skulu hava ávirkan á, at hvørja viðgerð teir fáa og um teir skulu hava viðgerð. Tí hevur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum, lagt fyri tingið uppskot um ríkislógartilmæli til at seta í gildi fyri Føroyar »lov om patienters retsstilling«. Hetta uppskot kemur til fyrstu viðgerðar á tingfundinum í dag.

Lógin tryggjar til dømis sjúklinginum møguleikan at sýta fyri at taka ímóti blóði og úrdráttum úr blóði. Eisini kann ein sjúklingur, sambært lógini, sýta fyri at meiningsleys viðgerð verður sett í verk, ella at hildið verður fram við slíkari viðgerð, tá hetta bert kann leingja um livitíðina, uttan at geva nakran bata annars.



Eisini gevir lógin borgarum møguleika fyri at gera eitt lívstestamenti, ið har teir sjálvir kunnu gera av, hvussu teir seinastu dagarnir skulu vera, um teir koma í eina støðu, har teir ikki sjálvir vera førir fyri at taka avgerðir hesum viðvíkjandi.

Lógin flytir eisini rættin at síggja sjúklingajournalir frá lógini um alment innlit yvir á hesa lógina. Somuleiðis verður kravið um tagnarskyldu og um rættin til at lata upplýsingar um sjúklingin til onnur flutt úr fyrisitingarlógini og skrásetingarlógini yvir í hesa lógina.



# Broytingaruppskot um Vágatunnilin

*Vinnunevndin fer í dag at leggja fram álit í málinum um undirsjóvartunnil undir Vestmannasundi. Talan verður helst um eitt broytingaruppskot*

John Johannessen

Talan verður helst um eitt broytingaruppskot, tá vinnunevndin seinnapartin í dag fer at leggja fyri løgtingið álit í málinum um Vágatunnilin.

Nevndin er tó ikki heilt liðug at viðgera málið enn, og tí ber enn ikki til við vissu at siga, um talan verður um eitt broytingaruppskot, og hvat innihaldið í broytingaruppskotinum verður. Seinasta viðgerðin av málinum verður í vinnunevndini í dag, og verður tað á hesum fundi, at endalig støða verður tikin.

### Landsverkfrøðingurin bjóða út

Sum skilst á formanninum í Vinnunevndini, Heina O. Heinesen, fer broytingaruppskotið helst at skjóta upp, at tað verður Landsverkfrøðingurin, ið bjóðar út tunnilsgerðina í staðin fyri, at tað verður P/F Vágatunnilin.

Heini O. Heinesen vil ikki siga nakað nevndarinnar vegna, men hann ger heilt greitt, at hann framvegis er ímóti ætlanini um, at eitt partafelag skal standa fyri at gera tunnilin undir Vestmannasundi.

– Eg haldi tað vera burturvið, at eitt partafelag skal bjóða út arbeiðið at gera tunnilin, tá vit í Føroyum hava ein stovn við drúgvum royndum at gera tunlar. Hetta ger bara arbeiðið nógv dýrari.

Formaðurin í vinnunevndini sigur seg tó ikki krevja, at Landsverkfrøðingurin skal gera alt tunnilsarbeiðið, men hann heldur tað vera skilabest og mest rímiligt, at Landsverkfrøðingurin stendur fyri at bjóða arbeiðið út.

– Tá vit hava Landsverkfrøðingin, ið er ein stovnur við drúgvum royndum og hollum kunnleika innan tunnilsarbeiði, haldi eg tað vera púra burturvið at landsstýrið í P/F Vágatunnilinum ger ein nýggjan Landsverkfrøðing, ið skal byrja á berum botni.

Heini O. Heinesen ger púra greitt, at hann undir øllum umstøðum vil hava Landsverkfrøðingin við í arbeiðið við Vágatunnilinum. Men tá einasta kravið er, at Landsverkfrøðingurin skal standa fyri at bjóða arbeiðið út, er spurningurin, um hetta ikki í veruleikanum er júst tað sama, sum at P/F Vágatunnilin bjóðar arbeiðið út. Tí tá eru somu møguleikar fyri, at tað verða útlendingar, ið gera arbeiðið.

– Nei, hetta er als ikki líka mikið. Landsverkfrøðingurin hevur royndir á økinum, og tí er tað er tað skilabest at Landsverkfrøðingurin hevur ábyrgdina av arbeiðinum, sigur Heini O. Heinesen.

### Skeivt at privatisera

Formaðurin í vinnunevndini er eisini ímóti, at P/F Vágatunnilin skal yvirtaka part av landsvegnum nærhendis tunnilinum.

– Føroyska vegakervið er alment, og eiga partar av tí ikki at verða privatiseraðir. Hetta er tað sama, sum at partar av linjunum hjá SEV brádliga komu á privatar hendur.

Heini O. Heinesen vísir á, at tað er alneyðugt, at vit hava eitt alment vegakervi í landinum, og tí er hann ímóti at privatisera tað. Hann vísir á, at verður tað Landsverkfrøðingurin, ið fær ábyrgdina av Vágatunnilinum, verður vegurin sjálvsagt ikki privatiseraður.

Heini O. Heinesen ger at enda greitt, at hann er sannførdur um, at Vágatunnilin fer at kosta einar 100 til 200 millónir meira enn væntað, verða tað útlendingar, ið standa fyri arbeiðinum. Somuleiðis roknar hann við, at hetta fer at verða endin á allari tunnilsgerð í Føroyum.



*Heini O. Heinesen er framvegis ímóti, at P/F Vágatunnilin skal standa fyri arbeiðinum at gera Vágatunnilin*

### Fakta um

Tað er sokallaða anlegslógin, ið gevur P/F Vágatunnilinum heimild til at standa fyri at gera Vágatunnilin og at fáa rættindi yvir pørtum av vegnum nærhendis tunlinum.

Anlegslógin varð løgd fyri tingið fyri jól. Hon hevur seinastu tíðina verið til viðgerðar í vinnunevnd løgtingsins, har stór ósemja hevur verið um málið.

Nevndarviðgerðin er nú um at vera liðug, og sum skilst, kemur vinnunevndin við einum broytingaruppskotið, áðrenn tingið fer undir aðru viðgerð av málinum.

# Rýmdi frá óhappi

Eirikur Lindenskov

Sunnudagin hevur onkur rent á ein bil, sum stóð parkeraður uttan fyri Hotel Føroyar í Havn.

Politiið fekk boðini klokkan 21:45. Ákoyrdi bilurin fekk stóran skaða - og tá skaðavoldarin ikki hevur boðoð frá, so hongur eigarin upp á skaðan.

Roknað verður við, at skaðin er gjørdur millum klokkan 19 og 21:30 sunnukvøldið.

Politiið í Havn vil tí fegið frætta frá fólki, sum vita nakað um óhappið at siga.

Hósdagin tók politiið í Havn upp trίggjar hundar - og enn hevur eingin fregnast eftir teimum, sigur Suni Vinther á Politistøðini í Havn. Tí rokna teir við, at eingin eigur ella vil vita av hundunum, sum tí verða avlívaðir, um eingin ger vart við seg. Um hundarnar verður sagt, at ein er svartur og miðal stórur. Annar er svartur og brúnur, og hin triðji er svartur. Hundarnir eru tiknir upp við Fútalág 19. Er onkur, ið kann hjálpa løgregluni við hesu málum, so er at venda sær til politistøðina í Havn, telefon 311448.

# Creamy til Føroya

Gitni bólkurin í Danmark, Creamy, kemur til Føroya á vitjan í næsta mánað.

Tær skulu hava konsert í Runavík sunnudagin 20. februar kl 17. Kappróðrarfelagið NSÍ hevur fingið bólkin hendanvegin.

Saman við gentubólkinum verða eisini Kular Røtur við

Forsølan av atgongumerkjum byrjar í morgin, og verða atgongumerkini seld á flest øllum Statoilstøðum kring landið, sigur kappróðrarfelagið í tíðindaskrivi.

Tað hevur gingið sera væl hjá bólkinum, har føroyska Rannvá Joensen er sjálv onnur. Bólkurin hevur í fimtan vikur verið á hittlistanum og hava eisini fingið fyrstaplássi á »Danmarks Officielle Hitliste«.




*Gitni gentubólkurin, Creamy, er ávegis til Føroya*

Creamy hevur nú fingið trífalt platin, nú tær hava selt yvir 190.000 fløgur.


HF Hotel Föroyar
Tlf. 317500
Hotellið við útsýninum

FLAMBERINGSKVØLD
Á HOTEL FÖROYUM

fríggjakvøldið 21. jan. og leygarkvøldið 22. jan.

TIL MATNA
- Flamberað havtaska í pernod v/smáttskornum urtum
- Piparbúffur við salat buffet og bakaðum epli
- Bananasplitt

Kostnaður kr. 198.-



Dinnertónleikur við Sámal Petersen og Jóhannus Andreasen

Borðbílegging á tel. 317500

Eisini fæst bílig gisting

Altíð vælkomin á Hotel Föroyar
Best Western
Tlf. 317500

Sosialurin - 311820